TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin við Sundsvegin**

Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 12 børnum í hvørjari. Stovnurin kann tó umskipast alt eftir um tørvur er á vøggustovu ella barnagarðsplássum

## Leiðari til nýggja dagstovnin "Sólareygað" við Sundsvegin

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til dagstovnin við Sundsvegin "Sólareygað", sum eftir ætlan verður liðugur um ársskiftið 2004/05, at byrja 1. desember 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú hevur møguleika fyri at seta dám á stovnin. Seta starvsfólk og annars vera við í øllum tí, sum skal til fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan. Møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving.

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum dagstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvið við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis
- er opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara ella Jákup Simonsen, deildarleiðara tlf. 302010

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi innan **týsdagin 17. august 2004.**

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið Vesturi á Flat**

Á stovninum eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari og ein vøggustova við 12 børnum. 4 starvsfólk í hvørjari stovu.

## Leiðari til Býlingshúsið Vesturi á Flat

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Býlingshúsið Vesturi á Flat at byrja 1. september 2004 ella eftir avtalu.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemið í einum býlingshúsi
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- er opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara ella Jákup Simonsen, deildarleiðara tlf. 302010 / 254022.

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi **innan týsdagin 10. august 2004.**

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnuri í Kaldbak**

Nýggi dagstovnurin í Kaldbak, ið eisini er frítíðarskúli er normeraður til 32 børn í aldrinum 0-10 ár.

Nýggi stovnurin verður tann fyrsti av sínum slag í Tórshavnar kommunu, hetta er fyrsti stovnur við børnum í aldrinum 0 - 10 ár.

## Pedagogar og Hjálparfólk
### - til nýggja dagstovnin í Kaldbak

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum og hjálparfólkum til nýggja dagstovnin í Kaldbak at byrja 16. august 2004 ella eftir avtalu

**Vit bjóða**
fimm áhugaverd størv, har starvsfólkið, saman við leiðaranum fær møguleika fyri at seta dám á stovnin og taka lut í øllum tí, sum krevst fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan.

**Vit vænta at tú**
hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrinum og starvsfeløgum.
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- saman við starvsfeløgum, er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- er kreativ/ur
- dámar at íðka ítrótt saman við børnunum
- dámar at vera úti í náttúruni við børnunum
- dugir at síggja møguleikar fram um forðingar
- er opin fyri bygnaðarbroytingum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jensinu Magnusen, stovnsleiðara,tlf.273766, ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 254022

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi innan **týsdagin 10. august 2004**.

www.torshavn.fo

*"Kjálkar, lippur, ræstur fiskur, upsastykkir við barbeque-smakki ....fyrsta floks delikatessur!"*

***- fisk til døgurða minst eina ferð um vikuna!***

**www.fiskakeyp.fo**



Á heimasíðu okkara finnur tú eitt stórt úrval av fiski og fiskaúrdráttum til matna. Og har finnur tú eisini døgurðauppskriftina!

Bíleggingarlisti liggur á heimasíðuni. Fyll út og send/faxa til okkara, so hevur tú vøruna við dyrnar 2-3 verkadagar aftaná. Tú kanst eisini ringja ordran inn á tlf. 21 53 35. Skjótt og ómakaleyst.



**Sonni FISKAKEYP**

690 Oyndarfjørdur
**Tlf. 21 53 35**
**Fax 44 52 45**

***- tín fiskaveitari á alnótini***

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



# Leiðari og telduvørður til nýggja KT-tænastu

**Fróðskaparsetur Føroya hevur skipað eina nýggja KT-tænastu. Nú verður søkt eftir tveimum fólkum, einum KT-leiðara og einum telduvørði, sum skulu skipa, menna og útbyggja KT-tænastuna**

Nýskipaða KT-tænastan hevur ein týðandi leiklut í menningini av Fróðskaparsetri Føroya.

KT-tænastan hevur ábyrgdina av teldunetinum hjá stovnunum á Debesartrøð og nær-netinum á Fróðskaparsetrinum. Hon skal stuðla setursdeildum og brúkarum við KT-nýtslu. Hon skal samstarva og samskifta við stovnar og KT-veitararar uttan fyri Fróðskaparsetrið. Og KT-tænastan skal ráðgeva setursráðnum í yvirskipaðum KT-málum frameftir.

Tað krevur tænastusinnað fólk, sum bæði eru tøkniliga væl fyri og hava visjónir. KT-leiðarin skal saman við telduvørðinum vera við til at menna og útbyggja nýggju KT-tænastuna.

**KT-leiðari**
KT-leiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina og kemur at standa fyri menningini av nýggju KT-tænastuni.
Vit kunnu bjóða eitt mennandi og spennandi arbeiðsumhvørvi, har samstarvað verður við fremstu føroysku granskararnar.

Vit rokna við, at umsøkjarar hava drúgvar royndir við at menna og skipa strategiskt KT-arbeiði. Tú hevur neyðuga førleikan at leggja framtíðarætlanir fyri KT-økið og persónligu eginleikarnar at fremja tær í verki. Tú hevur hægri útbúgving ella viðkomandi royndir innan kunningartøkni, leiðsluroyndir og góð samstarvsevni.

**Telduvørður**
Telduvørðurin hevur ábyrgdina av, at teldurnar virka nøktandi í dagliga arbeiðnum, og at data verða goymd og brúkt á skilabesta hátt.

Vit rokna við, at tú hevur royndir við teimum vanligastu KT-forritunum og ert vanur at vegleiða brúkarar í nýtsluni av teimum. Tú hevur viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir, ert íðin og hevur áræði og góð samstarvsevni.

**KT-tænastan**
KT-tænastan fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novell-netskipan og Novell Group-Wise postskipan, sum umsøkjarar mugu hava hollan kunnleika til.

Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar, sum brúka KT-skipanir dagliga til samskifti, gransking, undirvísing og fyrisiting.

Dagliga arbeiðið av datanetinum á Debesartrøð fevnir í stuttum um
- at hava eftirlit við kjarnuskipan og samsvarandi samskiftisútgerð
- at viðlíkahalda felags trygdartænastur hjá stovnunum
- at samskifta og samstarva við netvørðarnar á teimum fimm stovnunum
- at umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- at samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- at samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um størvini og tøknilýsing kunnu fáast við at venda sær til Anniku Sølvará á telefon 352500 ella teldupost annikas@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 16. august 2004. Vinarliga ger vart við, hvat starv tú søkir, ella um tú søkir bæði.

Størvini verða sett frá 1. september ella skjótast til ber.

Setursskrivstovan
J.C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-100 Tórshavn

*Fróðskaparsetur Føroya er stovnur við 40 starvsfólkum og 150 studentum. Virksemið fevnir í høvuðsheitum um undirvísing, gransking, kunning og fyrisiting.*

*KT-tænastan kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við telduvørðir á stovnunum, sum saman við Fróðskaparsetrinum mynda netsamstarvið á Debesartrøð: Fiskirannsóknarstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Náttúrugripasavnið. Talan er um eina fjølbroytta netskipan, sum bindur saman fimm stovnar í 12 bygningum við tilsamans 135 brúkarum.*

Fróðskaparsetur Føroya · J.C. Svabosgøtu 14 · Postrúm 272 · 110 Tórshavn · Tel 35 25 00 · Faks 35 25 01 · setur@setur.fo · www.setur.fo

www.sansir.fo

# Til sølu

Silvurgráur Toyota Corolla 1.9 E diesel stationwagon frá 09/00 verður hervið lýstur til sølu, um nóg høgt boð fæst.

Bilurin hevur koyrt 54.500 km.

Áhugað verða biðin um at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn
att. Jens Andrias Vinther, adv. ft.,
e-mail jav@jura.fo
ella
Birnu Joensen, skrivara, e-mail bij@jura.fo

# Hús í miðbýnum í Havn til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður ognin á Tinghúsvegi 13 lýst til sølu.

Grundøkið er 325 $m^2$.
Húsini eru í trimum hæddum og eru 8x6 metrar.
Í kjallaranum er kjallararúm og ein íbúð. Í íbúðini er køkur, stova, wc við brúsu og eitt kamar.
Í miðhæddini er gongd, stova og køkur.
Uppi á loftinum eru 4 kømur, gongd og wc við bað.

Áhugað kunnu ringja á **tlf. 224257** ella **422171**

# VW Golf diesel til sølu

Ein vælhildin VW Golf 1,9 CL, árg. 10/96, til sølu, um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur sóltak og tríggjar hurðar, sýnaður í 2004 og koyrt 81.000 km. Píkadekk á felgum fylgja við.

Áhugað ringið **tlf. 422507** ella **215507**

# Jørð í Porkeri til sølu

4 gyllin 10 skinn, heimari partur, matr. 242. Innangarðs vídd 4696 fermetrar.

Eitt traðarstykki, matr. 211, vídd 8529 fermetrar.

Verður selt, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 211278**

# Sethús í Tórshavn til sølu



| | |
|---|---|
| **Adressa:** | Dalavegur 47, 100 Tórshavn |
| **Stødd á húsum:** | 153 $m^2$ x 2 |
| **Loft:** | Ovasta loft |
| **Miðhædd:** | Gong, stova, køkur, grovkøkur, hjúnarrúm, 3 kømur, wc/bað, wc/brúsa og hjallur |
| **Kjallari:** | Dupult garaga, fýrrúm, kjallararúm og trappurúm |
| **Stødd á grundøki:** | 506 $m^2$ |
| **Byggiár:** | 1992 |
| **Yvirtøkudagur:** | Eftir avtalu |
| **Kostnaður:** | Hóskandi boð ynskist |

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling. Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram

**HÚSAMEKLING**

Sp/f Protek · Vaglið · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · e-mail: protek@post.olivant.fo

Sosialurin 341800